Fróðskaparsetur Føroya

3 september 2004

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 10/2004**

Tíð: Hósdagin 2. september 2004, kl. 13.00-15.15

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, varamegindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 9/2004 setursráðsfundi 25. juni 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál.** (J.nr. 0015-01111). Fíggjarstøðan 2004 varð umrødd. SSS sendir deildunum boð um at gera fíggjarstøðuna upp sambært M*annagongd fyri fíggjarætlan, býti og stýring.* Serliga mugu konturnar til leysalæraralønir og -ferðing, metingar og inntøkur kannast gjølla.

4. **Uppskot um samsýning til studentaumboðini í megindeildarráðunum.** (J.nr. 0015-01419). Uppskot frá AS um at lata fundarpengar til studentaumboðini. Uppskotið varð umrøtt, men fekk ikki undirtøku.

5. **Setan av KT-leiðara.** (J.nr. 021-01404). Setursráðið hevur millum funda tikið undir við tilmælinum frá setanarnevndini um at seta Hans Birgir Højgaard í starv sum KT-leiðara. Byrjanardagur var 1. september. Staðfest. SSS avgreiðir praktisku viðurskiftini.
Netráðið samtykti á seinasta fundi at hittast aftur at umrøða samansetingina av KT-stýrinum. Kallað verður inn sum skjótast.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

**6.** **Lestrarársbyrjan.** (J.nr. 0040-01304). SSS skipar fyri felags tiltaki hósdagin 9. september kl. 15.15 í Loftsstovu. Rektarin bjóðar nýggju studentunum vælkomnum og annars verður ymisk kunning á skránni. Borðreitt verður við onkrum leskandi aftaná.

7. **Val til megindeildarráðini og rektaraval 2004-07.** (J.nr. 0011-01379). Sambært valreglunum skal valnevndin hava fund fyrsta týsdag í september at skipa fyri valunum. SSS kallar inn. Malan Marnersdóttir boðaði frá, at hon ikki stillar upp aftur til rektaravalið.

8. **Løgtingslóg um gransking í mannaílegum. Uppskot til ummælis frá Almanna- og Heilsumálaráðnum.** (J.nr. 0010-01385). Uppskotið hevur verið á deildunum til ummælis. Svar er komið frá Elin Súsonnu Jacobsen og Eyðfinni Magnussen. Rektarin sendir felags svar við deildarsvarunum hjáløgdum.

9. **Námsskipanir á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. 0043-01382). Smábroytingar verða gjørdar í mun til fyrstu útgávuna frá juli. Verður staðfest millum funda. SSS sendir Mentamálaráðnum góðkendu námsskipanirnar til kunningar.

**10.** **Spurnarblaðarkanning hjá Granskingarráðnum – verkætlanin Hagtøl um gransking og menning í Føroyum.** Setursráðið samt um, at hetta er eitt týdningarmikið arbeiði, sum setrið stuðlar fult út. Spurnarblaðið er í fleiri løgum, okkurt má svarast sentralt, meðan summar talvur skulu svarast individuelt. Rektarin sendir øllum starvsfólkum bræv við teimum talvum, sum hvør einstakur skal fylla út. Starvsfólkini lata inn til megindeildarleiðaran, sum góðkennir, áðrenn tilfarið verður latið Setursskrivstovuni. Setursskrivstovan ger fíggjarligu metingarnar o.s.fr. og sendir Granskingarráðnum.

**11.** **Trupulleikin við teimum, sum halda til undir vegginum á Bátahøllini.** (J.nr.0091-00944). Trupulleikin er støðugt vaksandi. Setursráðið samt um, at nakað má gerast við málið nú, tí støðan er ótolandi fyri starvsfólk, studentar og gestir á Fróðskaparsetrinum. Setursskrivstovan arbeiðir víðari við málinum.

**12.** **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 5.7.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 24.8.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
c. **NUS-ráðstevna í Åbo 19.-21.8.04.** (J.nr. 0014-01359).
d. **HÖGUT-fundur í Reykjavík 25.-27.8.04.**
e. **NUAS-ráðstevna í Nuuk 10.-14.8.04.** (J.nr. 0014-01281)

**Avgreiðslumál:**

13. **Námsferðarstuðulin 2004 er býttur út sambært tilmæli frá ummælarum (yvirlit sum fundarskjal), og ein umsøkjari hevur fingið tilsøgn um stuðul í 2005 treytað av játtan. At staðfesta.** (J.nr. 0071-001126 og 0071-01392). Staðfest.

14. **Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon. Stanley Samuelsen, Birkerød hevur fingið loyvi at leggja ljóðfílir av løgum, hann hevur gjørt til tekstir hjá Janusi Djurhuus, á sína heimasíðu. At staðfesta.** (J.nr. 0073-01087). Staðfest.

15. **Ársroknskapur 2003 fyri Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovn at góðkenna.** (J.nr. 0016-01426). Góðkendur. Roknskapurin undirskrivaður á fundinum.

**Kunningarmál:**

16. **Á Føroyamálsdeildini eru tveir nýggir ph.d.studentar innskrivaðir 1.8.2004, Sólfinn Hansen og Katrin M. Næs ávikavist í skaldskaparvísindum og málfrøði. Báðar verkætlanirnar fígging úr Granskingargrunninum.** (J.nr. 0024-01422 og 0024-01424).

17. **51. norðurlendski málfundurin hildin í Tórshavn 27.-28.8.04. Føroyska málnevndin skipar fyri.** (J.nr. 0056-01421).

18. **Ráðstevna í Reykjavík 23.-24.9.04 "Globalt utdanningsmarked – Nordisk utfordring", Nordisk Ministerråds temakonference om fleksibel læring.** (J.nr. 0057-00155).

19. **NUAS-ráðstevna í Reykjavík 7.-8.10.04 "Arkiv med ambitioner – framtidsperspektiv och kvalitativ utveckling på kulturens grund".** (J.nr. 0014-01416).

20. **Ráðstevna "Kön och kunskap" í Åbo 12.-14.8.05, Det VIII Nordiska Kvinnohistorikermötet.** (J.nr. 0057-00155).

21. **Mál í mæti. Greinasavn eftir Jóhan Hendrik W. Poulsen. Føroya Fróðskaparfelag 2004.**

22. **Dizionario Orðabók, føroysk-italsk orðabók eftir Gianfranco Contri. Føroya Fróðskaparfelag 2004.**

23. **Ársfrágreiðing 2003, Jarðfrøðisavnið.**

24. **Ársfrágreiðing 2003, Fiskirannsóknarstovan.**

25. **Ársfrágreiðing 2002-2003, Postverk Føroya.**

26. **Årsberetning 2003, Aarhus Universitets Forskningsfond.**

27. **Beretning 2003, Ingeniørhøjskole i København.**

**28.** **Förslag till Nordiska ministerrådets Planer och Budget 2005, framlagt av generalsekreteraren 1. juni 2004, Nordisk Ministerråd.**

**29.** **Kunning frá Cirius Danmark – International uddannelse og praktik: "Fælles studieprogrammer inden for videregående uddannelse".**

30. **Frágreiðing frá Sune Rubak, Odder frá ferð í Føroyum 2003. Hann fekk stuðul til ferðina gjøgnum Mentamálaráðsins námsferðarstuðul.** (J.nr. 0071-00917).

Frágreiðing: Annika Sølvará